JÁKUP SVERRI ER STJÓRI SØNDERBORG LUFTHAVN:

# STÓRI VØKSTURIN FRÁ 2024 HELDUR FRAM Í 2025




**Sønderborg Lufthavn økti ferðafólkatalið við 11 prosentum í janaur og 15 prosentum í februar. – Vit eru sera væl nøgd við tølini fyri ársins fyrstu tveir mánaðir, og gleða okkum nógv til árið við methøgum virksemi**

*Eirikur Lindenskov*

Tað sigur Jákup Sverri Kass, sum er stjóri í Sønderborg Lufthavn.

Í 2024 var framgongdin í ferðafólkatalinum um flogvøllin uppi á 17,5 prosentum við tilsamans 58.142 ferðafólkum.

Harvið kom flogvølllurin á oynni Als í Suðurjútlandi í Danmark við besta ferðfólkatalinum síðani 2019, tá tey vóru 73.821 í tali. Koronufarsóttin í 2020 fekk ferðafólktalið at skrambla niður, og flogvøllurin hevur arbeitt hart fyri at fáa ferðafólkatalið um flogvøllin uppaftur, hóast avbjóðingar við færri vinnuferðafólki, sigur Jákup Sverri Kass.

Okkurt bendir á, at Sønderborg Lufthavn saman við felagnum Alsi Express av álvara hava funnið heilivágin til vøkstur, tí framgongdin hevur hildið fram teir báðar fyrstu mánaðirnar í 2025.

Í januar í ár vóru tað 3.444 ferðafólk, sum nýttu flogvøllin á Als, og tað vóru 11,3 prosent fleiri enn sama mánað í fjør, og í februar var talið uppi á 4.872, sum er 15 prosent meira, enn sama mánað í fjør.

Flogvøllurin í Sønderborg í Suðurjyllandi var stovnaður í sekstiárunum. Hann er seinast endurnýggjaður í 2000. Í 2021 skifti hann høvuðseigara – og fór frá at vera ein kommunalur flogvøllur til at verða privatur og kommunalur, tá grunnurin hjá Danfoss, BMC Fonden, keypti 50,1 prosent, meðan kommunan varðveitt hini 49,9 prosentini.

Stóra danska verksmiðjan, Danfoss, sum er kend fyri at gera termostatar til radiatorar og annað mangt, hevur sítt høvuðssæti í Sønderborg. Har starvast um 5.000 fólk av teimum 50.000, sum starvast hjá felagnum kring heimin. Danfoss vil fegin, at ein flogvøllur er í nærøkinum, sum kann tæna vinnulívinum, ferðafólkum og familjunum í økinum, og hevur tí á henda hátt keypt seg inn í flogvøllurin.

Jákup Sverri Kass sigur, at umframt vøksturin upp á 15 prosent í ferðafólkatali í februar, so var vøksturin í operatiónum, í komum og fráferðum, 35 prosent, so útlitini eru bjørt fyri flogvøllin í mun til aðrar slíkar vallir í Danmark, sigur hann.

## Met høgt virksemi í 2025

Um vøksturin frá fyrstu mánaðunum heldur fram alt árið, fer Sønderborg Lufthavn at koma upp á umleið 65.000 ferðafólk og harvið raka index 88 í mun til áðrenn koronufarsóttina.

Og tað eru tað góðir møguleikar fyri við teimum átøkum, sum eru sett í verk seinastu tíðina í Sønderborg Lufthavn, har ein nýggj ferðafólkfarstøð er í gerð, sum vætandi stendur liðug í 2027.

Bara í 2025 verður tað umframt føstu rutuna til Keypmannahavnar og eina summarrutu til Bornholm verða fráferðir til minst 15 leiguferðamál.

Við hesum hevur Jákup Svrri Kass, stjóri í Sønderborg Lufthavn, skrúvað vónirnar upp í topp til árið í ár.

– Vit eru sera væl nøgd við tølini, og vit eru sera spent upp á 2025 við methøgum virksemi. Við einum tillagaum ferðsluvirksemi til og frá Keypmannahavn, eins og metstórum leiguferðavirksemi hjá Gislev Rejser og Neubauer Turistik, eru vit væl á veg við royndum okkara at gera umheimin meira atkomuliga til og úr Sønderborg, Sjuðurjútlandi og marknaøkinum við Týskland, sigur Jákup Sverri Kass.



# Sønderborg Lufthavn fyrst við nýggjum talgildum flogtorni

**Flogferðslan í Sønderborg Lufthavn skal framyvir stýrast úr einum talgildum torni. Flogvøllurin hevur valt Saab sum veitara av nýggjari tøkni, so tað ikki longur er neyðugt við einum fysiskum torni**

*Eirikur Lindenskov*

Sønderborg Lufthavn verður fyrsti flogvøllur í Danmark, sum fer at hava eitt talgilt eftirlitstorn. Loysnin merkir, at tað ikki longur er brúk fyri einum fysiskum eftirlitstorni á flogvøllinum, og at virkisføri og trygd verða varðveidd.

Flogvøllurin hevur valt Saab (upprunaliga Svenska Aeroplan AB, red.) sum veitara til nýggju talgildu tornloysnina. Sambært Saab bøtir loysnin operativa virkisførið, tey sleppa undan tørvinum á einum nýggjum fysiskum torni og tryggjar, at øll operatørstørvini á staðnum verða varðveidd.

– Vit eru errin av samstarvinum við Sønderborg Lufthavn um at forma framtíðna fyri flogferðslustýring. Vit gleða okkum at veita okkara serfrøði til hesa stóru verkætlan í Danamrk, segði Per Ahl, stóri í Saab Digital Air Traffic Solutions.herfyri við danska loftferðslumiðilin Check-in.dk.

Sønderborg Lufthavn fær seinastu útgávuna av talgilgdu loysini hjá Saab, sum er skraddaraseymað til smærri flogvallir. Hendan nútímans tøknin kann takast í nýtslu soleiðis, at flogvøllurin kann virka sum vant, meðan nýggja tøknin verður tikin í nýtslu.

Jákup Sverri Kass samanber tað við at sita í einum stórum geymingrúmi heldur enn at vera fysiskt til staðar í einum torni við útsýni yvir flogvøllin.

– Eg kannaði eisini hetta, tá eg var stjóri í Vága Floghavn, men fekk bums nei tá frá Trafikstyrelsen, sigur hann.

Tá vóru hesini tornini ikki so nógv ment, sum tey eru í dag, sigur hann og fortelur, at sviar hava koyrt við hesum í 10 ár. Hann sigur, at har er ein flogvøllur í Svøríki, sum stýrir fýra øðrum smærri flogvøllum á henda hátt.

– Tað sparir nógv um rakstrarkostnaðirnar, at ein flogvøllum ikki skal hava manning í einum flogtorni, sigur hann og vísir á, at tey í Sønderborg hugsa sær, at tey eisini kunnu stýra ferðsluni við aðrar smærri flogvallir við hesi skipanini, sigur hann.

Spurdur um tað kundi komið upp á tal at stýrt ferðsluni í Føroyum á henda hátt sigur hann, at tá verða tað ov nógvar avmarkingar.

– Tú mást kenna landafrøðina, og í Føroyum eru alt ov nógv veðurviðurskifti sum gera, at tað ikki ber til at stýra tí úr Danmark.

## Vilja vera knútapunkt

Sønderborg Lufthavn hevur sum mál at gerast knútapunkt í Suðurjyllandi, styðjað av virkjum í økinum, sum eru við til at fíggja fastar flogrutur. Ein av teimum stóru stuðulunum er sum nevnt Danfoss, sum nýtir flogvøllin nógv.

Talgilda loysnin við torninum er ein liður í at broyta flogvøllin samsvarandi hesum.

– Við talgildu loysnini hjá Saab nútímansgera vit á ein slíkan hátt, at tað heldur flogvøll okkara effektivan og sambundan, meðan vit varðveita arbeiðspláss á staðnum. Tað er spennandi at síggja Sønderborg Lufthavn ganga á odda sum fyrsta flogvøll í Danmark við einum talgildum torni, sigur Jákup Sverri Kass, stjóri í Sønderborg Lufthavn.

## Í minsta lagi 15 ferðamál

Málið hjá flogvøllinum er at styrkja sambondini í økinum. Samstundis er málið at skapa øki sum eitt vaksandi ferðafólkamál.

Málið her harumframt at gerast eitt knútapunkt fyri viðlíkahald av flogførum, so flogvøllurin verður ein miðdepil bæði fyri ferðir og loftferðslutænastu.

Tað er Skyways Technics, sum í dag hevur tænastur á flogvøllinum í sambandi við viðlíkahald.

Sønderborg Lufthavn tekur eitt stórt stig í 2025. Umframt føstu ruturnar til Keypmannahavn og eina summarrutu til Bornholm, fer flogvøllurin at bjóða í minsta lagi 15 leigurferðamál í øllum Evropa. Tey, sum skipa fyri leiguferðunum, eru ávikavist Alsie Express, Gislev Rejser og týska Neubauer Reisen.



# NÓGVAR ROYNDIR Í FLUTNINGS-VINNUNI

**Hann er fyrrverandi løgtingsmaður, fyrrverandi stjóri í Vága Floghavn og fyrrverandi marknaðarleiðari hjá bæði Smyril Line og Atlantsflog. Nú er hann stjóri í Sønderborg Lufthavn í Danmark**

*Eirikur Lindenskov*

– Arbeiðið hjá mær er soleiðis skipað, at eg eri heima annaðhvørt vikuskifti. Eg havi bústað, børn og hús í Hoyvík.

Soeiðis sigur Jákup Sverri Kass, sum er stjóri í Sønderborg Luftan á Als í Suðurjyllandi.

Stjóristarvið á danska flogvøllinum hevur hann røkt síðani februar í fjør.

– Eg fekk eina uppringing frá BMC grunninum í oktober í 2023, har tey bjóðaðu mær ein túr til Sønderborg til eitt prát. Eg havi ikki søkt starvið. Men eg tók av og byrjaði her í februar 2024, greiðir Jákup Sverri Kass frá.

– Uppgávan er sera lík uppgávuni í Vágum á sinni, sigur Jákup Sverri Kass, sum var stjóri í Vága Floghavn frá 2012 til 2017.

– Vit skulu modernisera flogvøllin, gera íløgur fyri einar 212 milliónir krónur og menna flogvegisferðslu. Uppgávan líkist uppgávuni í Vágum, men er sera avbjóðandi á annan hátt, tí at nú eru vit á meginlandinum, har vit kappast vit eitt nú Hamburg og Billund.

Hann greiðir frá, at stórar íløgur verða gjørdar av ymsum slag í økinum.

– Danfoss og Linak eru størstu aktørarnir vinnuøkinum, men ferðavinnan er vaksandi. Og eg vænti, at ein stórur partur av vøkstrinum skal koma frá ferðavinnuni.

– Vit hava eitt lokalt flogfelag, sum eitur Alsie Express, og so hava vit síðani 2024 havt ein týskan charteroperatør, sum eitur Neubauer, at flúgva herfra eisini.

– Mín høvuðsuppgáva liggur í framhaldandi menna leidina til KBH, sigur hann og vísir á, at tað bara tekur hálvan tíma at flúgva millum Sønderborg og Keypmannahavn.

– Vit hava í dag umleið fimm komur og fráferðir um dagin til Keypmannahavnar. Uppgávanm er nú at menna eina flogleid til eina stóra floghavn í eitt nú Munchen, Amsterdam ella paris og so at menna innkomandi og útfarandi chartertrafik.

– Eg eri sostatt í samskifti við onnur flogfeløg og charterfeløg sum kundu hugsast at flogið uppá Sønderborg, sigur stjórin í Sønderborg Lufthavn, Jákup Sverri Kass, sum júst er valdur til formann í felagnum fyri smærri flogvøllir í Danmark, Grønlandi og Føroyum, 'De Regionale Lufthavne'. Har eru allir flogvallir við uttan teir stóru, Keypmannahavn,Billund og Aalborg.

– Og tey hava so valt ein føroying til formann, sigur Jákup Sverri Kass.

Jákup Sverri Kass er kent navn í føroyskari ferðavinnu. Tó bryjaði hann sum politikari, tá hann sum 21 ára gamla tók við sum løgtingsmaður fyri Sjálvstýriflokkin. Hann røkti sessin sum varamaður fyri Helenu Dam á Neystabø, sum var í landsstýrinum. Hetta var frá 1998 til 2001.

Hann var marknaðarleiðari hjá Smyril Line frá 2007-2009, marknaðarleiðari hjá Atlantsflog frá 2009 til 2011, stjóri í Vága Floghavn frá 2012-2017.

Hann hevur eisini verið nevdnarlimur í Kalaallit Airport í Nuuk í Grønlandi frá 2016-2020, undirvíst á Vinnuháskúlanum frá 2018-2024 og verið nevndarlimur í P/F Hotel Hafnia síðani 2018 – umframt hann síðani 2018 hevur verið dómari í bestu hondbóltsdeildunum í Føroyum.

Og frá februar í 2024 hevur hann verið stjóri í Sønderborg Lufthavn.